27. mai
*Tórshavn, 25. mai 2022*

# Semja millum Føroya Fiskimannafelag

# og

# Føroya Reiðarafelag

1.

Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag eru hervið samd um at leingja galdandi sáttmala, sum seinast varð gjørdur partanna millum tann 30. mai 2020 í eitt ár til 1. apríl 2023.

**§ 34. Gildi sáttmálans**

Hesin sáttmáli hevur gildi frá 1. apríl 2022 at rokna. Sáttmálin kann sigast upp við 2 mánaða freist til ein 1. apríl, tó í fyrsta lagi 1. apríl 2023.

2.

Í felagsreglunum § 22, stk. 15 verður sett sum nýtt 3. pkt: *Gjaldsskyldan hjá reiðara fyri dekkarar stendur við, inntil maðurin aftur er førur fyri at arbeiða, tó í mesta lagi 60 dagar.*

3.

Í sambandi við sáttmálan í 2020 varð gjørt eitt protokollat:

**"Protokollat**

*Vísandi til § 17, stk. 2 eru landingarútreiðslur loyvdur frádráttur í øllum bólkum.*

*Ásannandi at ávís ógreiða hevur verið í sambandi við frádrátt fyri landingarútreiðslur, eru partarnir samdir um í sáttmálaskeiðnum at fáa greiðu á teimum spurningum, sum máttu verðið í sambandi við hesar frádráttir, og í undirskjali at nágreina, hvørjar landingarútreiðslur eru at rokna sum loyvdir frádráttir."*

Partarnir hava nágreinað landingarútreiðslurnar og er semja um fylgjandi frádráttir fyri ísfiskatrolarar í bólki 2 og ísfiskalínuskip í bólki 3.

Ísfiskatrolarar:

- Kør: 0,55 kr/kg
- Kassar: 0,80 kr/kg
- Gulllaksur: 0,35 kr/kg
- Leyst: 1,00 kr/kg

Ísfiskalínuskip:

- Kassar/kør: 0,84 kr/kg

Upphæddin verður tillagað lutfalsliga í mun til broytingar í tímalønini fyri ófaklærd í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Føroya Arbeiðarafelag tann 1. mai 2021 (135,56 kr/tíman).

4.

Protokollat viðvíkjandi fastari daghýru:

*Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag hava til samráðingarnar á vári 2022 viðgjørt eina skipan við fastari dagløn fyri dekkarar/manningar umborð á trolarum í bólki 2. Partarnir ásanna, at fleiri skip í hesum bólki eru farin at nýta eina skipan við fastari daghýru. Partarnir eru í komandi sáttmálaskeiði samdir um at viðgera eina skipan við fastari daghýru við atliti til hýru, minstuløn, lógarkravdari eftirløn, eftirløn pr. dag, frítíðarløn, arbeiðstíð, møguligari makrelkvotu og gildi av skipanini. Miðað verður eftir at nágreina ásetingar í slíkari skipan, áðrenn sáttmálin rennur út næstu ferð.*

Semjan er undirskrivað í tveimum eintøkum.

Vegna Føroya Fiskimannafelag

Jan Højgaard, formaður

------------------------------------

Vegna Føroya Reiðarafelag

Stefan í Skorini, stjóri

------------------------------------